## Stuðul fyri at dálka minni

Í Grønlandi eins og í Føroyum er fiskivinnan ein av teimum stóru syndarunum, tá talan er um CO2-útlát. Men sambært stjóranum í fiski- og veiðimannafelagnum KNAPK, John Biilmann, eru fiskaprísirnir nú so lágir, at fiskivinnan má fáa almennan stuðul, um hon skal skerja sítt útlát av CO2 við at nútímansgera verandi flota ella við at gera íløgur í nýggj veiðifør. Hann sigur við KNR, at vinnan kann fremja fleiri tiltøk og tekur eisini undir við at skerja útlátið. Men fær vinnan ikki fleiri inntøkur enn nú, verða eingir pengar til nútímansgerð ella nýbygging, sigur John Biilmann við KNR.



## Fleiri kvinnur í nevnd

Kvinnurnar hava fingið undirtøku fyri nógvum av sínum krøvum, men tað er framvegis ymiskt eftir, sum vert er at stríðast fyri. Tað sigur grønlendski fólkatingslimurin Juliane Henningsen (myndin) í sambandi við altjóða kvinnudagin, sum var í gjár. Í samrøðu við KNR sigur hon, at kvinnurnar duga ikki nóg væl at brúka síni rættindi til politiska ávirkan. Millum annað nevnir honm, at 80 prosent av nevndarlimunum í feløgunum, sum grønlendska heimastýrið eigur ella eigur í, eru menn. Tað má broytast, sigur Juliane Henningsen, sum umframt at vera fólkatingslimur situr í grønlendska Landstinginum.



*Einar 300 kvinnur høvdu leitað sær í Norðurlandahúsið í gjár í sambandi við Altjóða Kvinnudagin*

# Kvinnur tíma ikki at grenja

**Fá skil á tínum pengum, flenn at gomlum kynsleiklutum, tak av stjórastarvinum og lat teg í ljósareytt, tá tað passar tær. Rættar kvinnur tíma ikki at grenja - heldur ikki á Altjóða Kvinnudegnum**

ALTJÓÐA KVINNUDAGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Ofta setti spurningurin, um tað yvirhøvur er viðkomandi at halda Altjóða Kvinnudagin longur, svaraði seg sjálvan, tá dyrnar lótu upp í Norðurlandahúsinum í gjár til tiltakið hjá Kvinnufelagnum í Havn. Fleiri hundrað kvinnur í øllum aldri høvdu gjørt av at brúka sín sunnudag seinnapart at lata hugin, eyguni og oyruni reika í ymistáttaða kvinnuliga universinum - heilt frá Noru, sum stakk av frá sínum dukkuheimi, til eina atkvøðugreiðslu, har tær ongan iva lótu vera um, at heimurin hevur brúk fyri Kvinnufeløgum.

### Fá skil á pengunum

Á ymsar mátar snúði kvinnutiltakið seg um at avlívar gamlar mytir. Eitt nú myturnar um at kvinnur ikki hava skil fyri pengum ella at pengar ikki er nakað, tú tosar um. Skil á tínum pengum fært tú lætt, um tú bara brúkar eitt lítið sindur av orku til at seta teg inn fíggjarheimin, sum als ikki er so fløktur, sum hann fegin vil geva fatan av. Við fáum broytingum ber til hjá teimum flestu at fáa javnvág millum inntøku- og útreiðslur. Afturfyri fært tú minni tørv á at troysta teg sjálva við at brúka meir pening, enn tí eigur og á tann hátt sleppa undan ónda sirklinum, vit ofta enda í.

Og so er tað nakað tvætl, at pengar ikki er nakað man tosar um. Sjálvandi skulu vit tosa um pengar, tí sambært Nebelong er tað einasti mátin við kunnu avdúka óheppin nýtslumynstir og harvið broyta tey.

Sambært Lisbeth Nebelong eigur herjandi fíggjarkreppan heldur ikki at taka mótið frá okkum. Og slett ikki frá kvinnum. Fíggjarbløðran, sum brast, hevur nevniliga gjørt tað enn meir átroðkandi at vit finna gomlu (kvinnuligu) dygdirnar fram aftur: at vera kreativar, og gera tað til ein stuttleika at fáa pengarnar at røkka við at rudda upp í óneyðugum útreiðslum og spara, har vit kunnu.

### Imponerandi ónyttur

Mytur um mannfólk og konufólk vóru eisini endavendar í skemtiligari hugleiðing hjá Katrini Petersen um kynsleiklutir. Hon hevði í øllum førum lætt við at ímynda sær eitt samfelag, har kvinnur als ikki hava brúk fyri monnum - líka burtursæð hasum við at gera børn. Restina av tíðini máttu mannfólkini gera seg nyttugar og áhugaverdar uppá aðrar mátar í fiktivu søguni hjá Katrini Petersen - sum skjótt nærkaðist veruleikanum. Millum annað mugu vit nokk staðfesta, at mátarnir mannfólk royna at imponera konufólk eru munandi meir sofistikeraðir enn mátarnir, kvinnur royna at imponera teir. Eitt nú kunnu teir snilt og skjótt imponera onnur mannfólk við onkrum fullkomiliga ónyttugum og á onkran mystiskan máta samstundis vaksa í eygunum konufólki. Hygg bara